



Puntur nr.10

# Ferðamál: Oxford Street, London




*Oxford Street liggur í The City of Westminster í West End-partinum av London, ið roknast sum miðbýurin*

**Torfinnur Jákupsson, ið er lesandi í London, setir í hesi greinini fokus á Oxford Street, ið er ein av kendastu handilsgøtunum í heiminum**

LONDON
*Torfinnur Jákupsson*

Ferðast tú til Onglands sum føroyingur, er vert at vitja mongu handilsgøturnar í miðbýnum. At ganga í Oxford Street í rush hour er sera øðrvísi enn at ganga oman eftir gongugøtuni í miðbýnum í Havn. Einans til midnáttarsangin á Ólavsøku er kanska líka trongt í Havnagøtum, sum tað er í Oxford Street hvønn dag.


*Oxford Street liggur í The City of Westminster í West End-partinum av London, ið roknast sum miðbýurin*

### The West End

Oxford Street liggur í The City of Westminster í West End-partinum av London, sum vanliga verður róptur fyri at vera miðbýurin.

The West End fevnir m.a. um handilsgøturnar Oxford Street og Regent Street, ið ganga oman til Piccadilly Circus. Tætt við Oxford Street er eisini filmslandið Leicester Square, ið javnan fær vitjan av teim kendastu í filmsverðini, tá størstu filmsfrumsýningarnar verða hildnar. Soho er eisini hugnaligt umhvørvi, og Bond Street, ið eisini leingir Oxford Street, er gitin fyri sínar klæðna-, lista- og prýðishandlar.

The West End endar við Baker Street norðanfyri, ið vit m.a. kenna bretska detektivfigurin Sherlock Holmes frá. Oxford Street rennur seg eisini í aðrar kendar gøtur í miðbýnum so sum Park Lane, New Bond Street, Tottenham Court Road og Marble Arch.

### Ein forbrúkarahimmal

Oxford Street er tó høvuðsgøtan, og er hon ein av virknastu gøtunum í øllum Evropa. Oxford Street er best kend fyri mongu handilsmiðdeplarnar, so sum Selfridges, Marks & Spencer, John Lewis, Debenhams og aðrar, sum tó kanska ikki øll kenna nógv til í Føroyum.

Oxford Street er okkurt um fimm kilometur long, og ja, hon er full við handlum. Ongin ivi er um, at nógv virka á Oxford Street dagliga, og somuleiðis nýta nógvar pengar í klædna-, mat-, fløgu- og prýðishandlunum eins og aðrastaðni.

Flestu handlarnir opna kl. 10 á morgni og lukka kl. seks ella sjey um kvøldið. Onkrir hava opið sunnudag millum tólv og seks tíðina, og teir flestu hava sonevndar langar hósdagar.

### Eitt vindeyga til framgongd

Oxford Street rennur saman við Regent Street og Bond Street og aðrar gøtur. Annað handilsøki í London, ið er vert at vitja sum føroyingur, er Knightsbridge.

Men fyri allarflestu handilsketurnar í Onglandi, er handilsumboðanin á Oxford Street tann mest týðandi, ið til ber at fáa. Oxford Street verður roknað sum eitt vindeyga til framgongd, og eru handilsdeildirnar í Oxford Street eisini ofta karmur um tær nýggju vørurnar, ið koma út á marknaðin.

*Í oktober mánaða í fjør var Oxford Street Party við til at seta syrgiligu yvirgangsatsóknirnar í undirgrundini í annað ljós*


### 3'arin vs. HMV

Gott dømi um, júst hvussu nógv tær størstu handilsketurnar leggja í umboðan sína í Oxford Street, er hon hjá bretsku tónleikahandilsketuni HMV.

Hjá teim tónleika- og filmsáhugaðu føroyingunum ber m.a. til at fara inn í høvuðsdeildina HMV, ið liggur væl fyri á Oxford Street. HMV hevur tríggjar handlar á sjálvari gøtuni umframt umboðan í Selfridges og høvuðsdeildina, ið húsast í bygningi nr. 150 í Oxford Street.

Henda høvuðsdeildin hjá HMV myndar størsta tónleikahandilin í øllum Evropa, og er hann 4500 fermetrar stórur.

Nakað størri enn 3'arin í SMS, kunnu vit siga.




